# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Ebenezer**
Hósdag kl. 20.00 Ungdómsmøti - Møti er í Hebron á Argjum, talari: Jógvan Jacobsen. Fríggjadag kl. 20.00 Teen-Night.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti. www.ebenezer.fo

**Nazaret, Kaldbak**
Á møtinum sunnukvøldið 17. september kl. 18.00 talar Ingvard Petersen, Ingvard og konan Erla virka sum trúboðarar í Venezuela.

**Filadelfia, Miðvágur**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Miðvágs Missiónshús**
Leygardagin kl. 13.00-17.00 Loppumarknaður og tombola.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti v/ Bergur Debes Joensen. Hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Kedron í Sørvági**
Sunnudagin kl. 11.00 Uppbyggingarmøti við breyðbróting, kl. 11.30 Sunnudagsskúli - fyri øll børn, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Talarar frá bønarráðsstevnuni.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Týskvøldið kl. 20.00 Bíbiltími. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10,30 Møti. Øll hjartaliga vælkomin.

**Hvalvíkar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake við Hjørdis H. Petersen.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Paula Høj, evni: Trúgv. Barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í kelduna. www.keldan.fo

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 13.30 verður Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Leilu Højgaard og kl. 21.00 Ungdómsmøti.

**Getsemane, á Brekku 19, Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 10.00 Morgunbøn.
Sunnudagin kl. 14.00 Møti við sunnudagsskúla. Fríðbjørg Michaelsen talar. Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 Morgunmøti.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið k. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v/ Preben Hansen.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Hóskvøldið kl. 19.00 Bønarløta.
Fríggjakvøldið kl. 22.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við Kristian Fríðrik Olsen, kl. 21.00 Ungdómsmøti. Øll vælkomin. www.kuff.fo



**Innbjóðing frá Torgerð Suðuroy**

*Kæru vinir frá nær og frá fjar*
*Komið og hugnið tykkum við mær*
*20. oktober vit halda gildi*
*í VB húsi tað verður hildið*
*Nú fylli eg seksti*
*Og haldi tað beinast*
*Tí fjøruti ár*
*Síðani føðingardag helt seinast*
*So ofta eg var í so mongum vási*
*Til vælkomst eg bjóði, so finnið fram stásið*
*Ja, víðfevnt var virkið, tað ásannast enn*
*So teknið bert til, bæði kvinnur og menn*
*Eg vóni at síggja bæði starvsfólk og kundar*
*Og øll tykkum mongu, eg hitti til fundar*
*Tá spelkin og fim eg um vøll mundi renna,*
*Og lærdi mangt ítróttarfólk har at kenna*
*Og eisini til undirhalds kendi mitt kall*
*Og leikin so mangan vit fingu á pall*
*Teir leikir landið runt vit spældu*
*Og eisini her mangar vinir eg taldi*

Hjartaliga vælkomin øll somul, tekning á tlf. 373169 og 253177 og 262633.

PREKVALIFIKATIÓN

## Útbygging av Norðurlandahúsinum

Landsverk er byggiharri fyri almennar uppgávur, og henda verkætlan verður útboðin vegna Stýrið fyri Norðurlandahúsið.

Ætlandi verður útbyggingin framd í partnering. Samráðingar verða við áhugaðar arbeiðstakarar um luttøku í byggingini, grundað á byggiprogramm. Brutto fíggjarkarmurin er 13,5 mió. kr. Arbeiðið skal verða liðugt 1. mars 2008.

**Lýsing av verkætlanini**
Norðurlandahúsið hevur ætlan um at víðka um verandi hølisviðurskifti við einum 270 m2 stórum tilbygningi í tveimum hæddum ætlaður ráðstevnum, framsýningum v.m.

**Umbøn um luttøku**
Umbønin skal sendast til lv@lv.fo

ella:
Landsverk
Postboks 78
Tinghúsvegur 5
FO-110 Tórshavn

Áheitanin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. september 2006.

**Samtøk og felagsskapir**
Allir luttakarir í einum samtaki ella líknandi felagsskapi skulu geva skrivliga váttan fyri felags hefting og ábyrgd fyri sáttmálanum. Felagsskapir og samtøk skulu harafturat frammanundan tilnevna ein umboðsmann við skjalprógvari fulltrú til, vegna felagsskapin ella samtakið at tekna bindandi avtalur við byggiharran.

**Upplýsingar at nýta til prekvalifikatiónina**
Umsøkjarir skulu saman við eini umbøn um luttøku senda fylgjandi upplýsingar við:
- Upplýsingar um arbeiðstakarans egnu viðurskiftir og tær neyðugu upplýsingarnar og formleikarnar til meting av tí kravdu minstuorku av búskaparligum, fíggjarligum og tekniskum slagi.
- Upplýsingar um bygnaðin hjá fyritøkuni, herundir møguligt samband við móðirfelag.
- Váttan ella trúnaðarváttan um, í hvønn mun arbeiðstakarin hevur ógoldnað skuld til tað almenna, ið er fallin til gjaldingar.
- Avrit av viðkomandi vinnulívstrygging, upplýsing um eginpening og javna í roknskapi, tá ið søkt verður, saman við váttan av samlaða umsetninginum í miðal seinastu trý árini.
- Upplýsing um árliga meðaltalið av fólkum í starvi hjá fyritøkuni.
- Ummæli frá samsvarandi uppgávum.
- Lívsgongdarlýsing (cv) hjá lyklafólkum, ið verða sett á hesa uppgávu.
- Upplýsingar um góðsku-, trygdar- og heilsuskipanir, umframt umhvørvisstýrisskipanir hjá fyritøkuni.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

FØRARI TIL betongpumpubil

Søkt verður eftir fólki at koyra betongpumpubil.

Arbeiðið er sjálvstøðugt og koyrt verður av blandistøðini á Hjalla.

Tann, ið settur verður kemur at hava ábyrgdina av betongbilinum og skal vera røkin.

Byrjast kann beinanvegin ella eftir nærri avtalu

J&K

P/F J & K Petersen · Tel 31 50 60 / Fax 58 50 01
e-mail JKP@JKP.FO